# Yvirtøkan av fólkakirkjuni: Bispur aftur nú settur útum

**– Tað sær framvegis út til, at Landsstýrið ætlar at halda kirkjuna uttanfyri, nú samráðingar um at yvirtaka fólkakirkjuna, halda fram, sigur Hans Jacob Joensen, bispur**

FÓLKAKIRKJAN
*Áki Bertholdsen*



Landsstýrið ætlar eftir øllum at døma framvegis at halda fólkakirkjuna uttanfyri samráðingarnar um at yvirtaka fólkakirkjuna.

Í seinasta valskeiði var ein miseydnað roynd gjørd at yvirtaka fólkakirkjuna, men tá varð harðliga funnist at landsstýrinum fyri at skúgva kirkjuligu myndugleikarnar í Føroyum til viks í spurninginum um yvirtøkuna at fólkakirkjuna.

Nógv av teimum, sum arbeiða í kirkjuni í Føroyum fýltust á, at samráðingarnar um at yvirtaka fólkakirkjuna fóru fram yvir høvdinum á teimum, uttan at tey, sum høvdu við kirkjuna á gera, upp á nakran máta fingu ávirkan á tað, sum hendi.

Men nú nýggja samgongan varð skipað høvdu tey, sum hava við kirkjuna at gera, væntað eina øðrvísi mannagongd.

Tí í samgonguskjalinum stendur beinleiðis, at »Fólkakirkjan verður í samstarvi við allar partar í føroysku kirkjuni yvirtikin, so hon kann halda fram í verandi bygnaði, og meirútreiðslur í samband við yvirtøku verða goldnar av landskassanum«.

– Eg má viðganga, at orðini í samgonguskjalinum gjørdu, at vit høvdu væntað okkum nýggja tónar úr landsstýrinum, sigur Hans Jacob, Joensen, Bispur.

– Men eg má samstundis ásanna, at tað er ongin broyting hend og at fyribils tykist tað, sum um Landsstýrið framvegis ætlar, at tey, sum hava við kirkjuna at gera skuldu haldast fullkomiliga uttanfyri alla ávirkan.

– Vit mugu staðfesta, at antin merkja orðini í samgonguskjalinum ikki tað, vit hildu at tey merktu, ella verða tey ikki hildin.

Hans Jacob Joensen vísir á, at síðani nýggja samgongan varð skipað, hevur Bispur, hvørki hoyrt orð ella eið úr landsstýrinum.

*– Eftir at hava lisið samgonguskjalið, havi eg bara bíðað eftir at vita, um tað vóru gerðir aftanfyri orðini í nýggja samgonguskjalinum. Men pappírið er tolið og enn er ongin broyting at hóma, sigur Hans Jacob Joensen, Bispur*

– Enn hevur landsstýrið ikki vent sær til mín um nakað sum helst.

Kortini hevur fundur verið í Keypmannahavn ímillum føroysk og donsk embætisfólk um yvirtøkuna av fólkakirkjuni.

Í samrøðu við Trúboðan vísir Annlis Bjarkhamar, landsstýriskvinna, at hesin fundurin var eitt framhald av fundunum sum vóru í seinasta valskeiði, men sum steðgaðu, tá valið varð útskrivað.

Samstundis staðfestir hon eisini, at grundarlagið undir samráðingunum er framvegis uppskotið sum ein nevnd gjørdi um yvirtøkuna av fólkakirkjuni – og sum bispur als ikki tekur undir við.

– Sostatt mugu vit staðfesta, at tað er als ongin broyting hend, men at landsstýrið heldur fram í sama sporið sum í seinasta valskeiði við at halda kirkjuliga myndugleikan í Føroyum uttanfyri alla ávirkan, hóast tað beint øvugta stendur í samgonguskjalinum.

– Tað einasta, eg havi frætt var frá fráfarna landsstýrinum í mars mánaði, har eg varð spurdur, hvat kirkjuligi myndugleikin hevði sagt til at verið við í arbeiðnum at yvirtaka fólkakirkjuna.

– Eg svaraði aftur, at tað var landsstýrismaðurin, sum hevði sett okkum uttanfyri, so tað mátti eisini vera hann, sum tók okkum upp í aftur, men at eg helt, at nú var nýtt løgtingsval í hondum og at tað mátti vera tann nýggi landsstýrismaðurin, sum tók avgerð um tað.

– Síðani hoyrdi eg onki aftur og eg dugi avgjørt ikki at síggja nakra sum helst broyting, sigur Hans Jacob Joensen.

– Hvat so verður framyvir, vita vit ikki, leggur hann afturat.

Hann vil kortini ikki siga, at hann er vónbrotin av tí, sum er hent, tí hann hevur leingi sæð, hvønn veg tað bar.

– Men nú eg las samgonguskjalið, havi eg bara bíðað eftir at vita, um tað vóru gerðir aftanfyri orðini í nýggja samgonguskjalinum. Men pappírið er tolið og enn er ongin broyting at hóma.

### Vórðu koyrd frá

Hans Jacob Joensen sigur, at nevndin, sum sat og arbeiddu við føroysku kirkjulógir í sambandi við yvirtøkuna, varð meiri ella minni sett frá og síðani hevur kirkjan als onga ávirkan havt á gongdina.

Hinvegin varð ein nýggjur bólkur settur at gera føroyskar kirkjulógir, men har sat onki umboð fyri kirkjuna.

– Men vit fingu eisini at vita, at ætlanin var at yvirtaka kirkjuna, hóast lógir og fyrisitingarreglur ikki vóru liðug, tí tað kundi koma aftaná.

– Tað kunnu vit ikki annað enn taka til eftirtektar, hóast vit eru grundleggjandi ósamd, tí vit halda avgjørt, at tað er neyðugt at lógargrundarlagið verður gjørt liðugt, áðrenn yvirtøkan verður framd so tað er heilt greitt frá fyrsta degi, hvat kirkjan skal bera í sær ístaðin fyri at koma aftaná og gera lógir og reglugerðir so við og við, tí tað kann fáa óhepnar avleiðingar.

Tað eydnaðist okkum tíverri ikki at fáa eina viðmerking úr Mentamálaráðnum, áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Løgmaður setir treytir fyri yvirtøkuni av fólkakirkjuni

**– Løgmaður hevur nú givið Mentamálaráðnum greið boð um at orðini í samgonguskjalinum um yvirtøkuna av kirkjuni skulu haldast, so allir partar vera við í arbeiðnum**

FÓLKAKIRKJAN
*Áki Bertholdsen*



*Anfinn Kallsberg, Løgmaður, sigur, at hann fer at syrgja fyri, at tey í Mentamálaráðnum halda samgonguskjalið so at allir partar í kirkjuni verða tiknir við í yvirtøkuna av fólkakirkjuni*

Nú arbeitt verður við at yvirtaka fólkakirkjuna, skulu allir partar takast við upp í arbeiðið.

Tað ætlar Løgmaður sær at syrgja fyri.

Sum tað sæst í greinini omanfyri, heldur Hans J. Joensen, Bispur, at ongin broyting er hend í framferðini hjá landsstýrinum eftir at kirkjan varð útihýst frá arbeiðnum at yvirtaka fólkakirkjuna.

Men í nýggja samgonguskjalinum stendur, at kirkjan skal yvirtakast í samstarvi við allar partar í kirkjuni.

Men kortini var fundur við donsk embætisfólk síðst í juni, har samráðingar um yvirtøku halda fram uttan at tey, sum arbeiða í føroysku kirkjuni enn hava frætt eitt orð úr Landsstýrinum.

Men hetta ætlar Løgmaður ikki at lata sær lynda.

– Eftir fundin í Keypmannahavn havi eg givið Petur Petersen, aðalstjóra í Mentamálaráðnum greið boð um, at orðini í samgonguskjalinum skulu fylgjast.

– Tað merkir, at tað, sum víðari fer at henda í hesum máli, skal vera í neyvum samstarvi við allar partar í kirkjuni.

Løgmaður sigur, at hann fer at syrgja fyri, at samgonguskjalið verður hildið á hesum øki og hann fer eisini at fylgja við gongdini í málinum, so at tað samgonguskjalið veruliga verður hildið.

– Áðrenn fleiri samráðingar verða ímillum føroyingar og danir um yvirtøku av fólkakirkjuni, fari eg at syrgja fyri, at allir partar verða tiknir við, soleiðis sum samgonguskjalið leggur upp til.

Hann sigur, at orðini í samgonguskjalinum skulu skiljast so, at allir partar í kirkjuni skulu vera við í sjálvari yvirtøku-tilgongdini og vera við til at ávirka sjálvt arbeiði at yvirtaka kirkjuna.

– Hetta skal ikki skijast soleiðis, at kirkjan skal yvirtakast og at partarnir í kirkjuni aftaná skulu kunnast um gongdina. Teir skulu alla vera við í arbeiðnum.

Anfinn Kallsberg sigur, at hann hevur eisini givið dómpróstinum tað lyfti, at orðini í samgonguskjalinum verða hildin, so at partarnir í kirkjuni verða tiknir við í arbeiðið at yvirtaka kirkjuna.

– Tað er ógvuliga umráðandi fyri meg, at allir partar í fólkakirkjuni vera við, so at yvirtøkan kann fara fram í neyvum samstarvi við allar partar í fólkakirkjuni, sigur Anfinn Kallsberg.



# Pedagogar mangla í Klaksvík



*Jancy B. Klein, leiðari á sosialu deild í Klaksvíkar Kommunu, heldur, at tað kann tykjast sum pedagogar í dag søkja meir inn á serøkini enn barnaansingina*

**Søkt hevur verið fleiri ferðir eftir leiðara til útibarnagarðin úti í Grøv í Klaksvík. Umsóknarfreistin var úti 01. juli og ongin pedagogur hevur søkt. Tørvurin á pedagogum í Klaksvík er sera stórur**

BARNAANSING
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Jancy B. Klein, leiðari á sosialu deild í Klaksvíkar Kommunu, sigur, at tað er sera harmiligt, at ongin pedagogur hevur søkt leiðarastarvið í nýggja útibarnagarðinum.

Nýggi útibarnagarðurin úti í Grøv skal eftir ætlan lata upp í august.

– Og tað fara vit eisini at gera alt fyri, at hann ger, men tað er greitt, at tað kann fara at gerast trupult, sum støðan er nú við ongum leiðara. Men vit eru ikki púra fyri ongum, sigur Jancy B. Klein.

– Vit hava onkra loysn í huga, men tað kemur so bert at vera ein fyribilsloysn, og tað er ikki nøktandi. Men okkurt má gerast, tí barnagarðurin má lata upp.

Hon sigur eisini, at tørvurin á pedagogum í Klaksvík er ovurhonds stórur.

Hon greiðir frá, at herfyri bleiv gjørt upp, hvussu mong ósett pedagogstørv tað eru í barnagørðunum í Klaksvík.

Tað eru tríggir barnagarðar í Klaksvík, og heili 22 pedagogstørv eru ósett. Tað vil siga, at hjálparfólk sita í teimum størvunum.

Jancy tekur dr. Margrethubarnagarðin sum dømi:

– Har eru næstan hundrað børn, og einans tríggir pedagogar. Tað er ikki ein gongd ein til hvørja stovuna. Og hetta er bert í barnagørðunum, so koma bústovnarnir afturat, sigur hon.

Hon heldur, at tað hevði gjørt stóran mun um nøkur ár, um námsfrøðiliga útbúgvingin, sum er á Føroya Læraraskúla, hevði kunnað tikið tveir flokkar inn um árið. Sum er taka tey ein flokk upp á 24 inn.

Jancy heldur eisini, at tað kann tykjast sum pedagogar í dag søkja meiri inn á serøkið enn barnaansingina. Ein orsøk til tað kann vera, at lønin er betri á serøkinum.

### Allan tørv nøktaðan

– Tað verður arbeitt fram í móti, at dagrøktararnir skulu hava børn í aldrinum 0 til 3 ár, og so er dreymurin, at børnini sum trý ára gomul fáa stovnspláss, greiðir Jancy frá.

Hon sigur, at sjálvandi er dreymurin hjá teimum, at fáa allan barnaansingartørvin nøktaðan, men hon dylur ikki fyri, at tað koma at taka nøkur ár, áðrenn dreymurin gerst veruleiki.

Børnini í einum útibarnagarði eru í aldrinum trý til fýra ár og uppeftir.

Útibarnagarðurin úti í Grøv er um at verða klárur. Tað verður málað uttanfyri nú, og møblarnir eru eisini á veg. Og í hesi vikuni fara avvarðandi myndugleikar at hyggja umsóknirnar í gjøgnum, so at starvsfólkini kunnu setast. Og so skuldi onki mangla til tey 40 hepnu børnini, sum hava fingið pláss har – onki uttan ein leiðari.


## Stórur brúktbila-markna› ur

| | |
|---|---|
| **Mazda 323 C 1,8l GLX**<br>reyður, 5 hurðar, 5 gear,<br>árg. 04/00, km 44.000<br>s‡na› ur 03/02 **128.000,-** | **Ford Escort 1,8 Diesel Sedan**<br>svartur, 4 hurðar, 5 gear,<br>árg. 08/95, km 146.000<br>s‡na› ur 07/01 **76.000,-** |
| **Mazda 323 C 1,5i LX**<br>bláur, 3 hurðar, 5 gear,<br>árg. 03/97, km 72.000<br>s‡na› ur 01/02 **68.000,-** | **Ford Escort HB 16V**<br>reyður, 5 hurðar, 5 gear,<br>árg. 10/96.<br>**70.000,-** |
| **Mazda 323 S 1,5i LX**<br>beige, 4 hurðar, 5 gear,<br>árg. 05/96, km 125.000<br>s‡na› ur 09/01 **80.000,-** | **Ford Escort St.car 1,6 Zetec**<br>grønur, 5 hurðar, 5 gear,<br>árg. 06/98, km 33.000<br>**92.000,-** |
| **Mazda 323 S 1,5i LX**<br>reyður, 4 hurðar, 5 gear,<br>árg. 05/97, km 69.000<br>s‡na› ur 02/02 **78.000,-** | **Opel Vectra 2,0i Expression**<br>lilla, 4 hurðar, 5 gear,<br>árg. 1987, km 193.000.<br>s‡na› ur 03/01 **48.000,-** |
| **Mazda 626 S 2,0i GLX**<br>hvítur, 4 hurðar, 5 gear,<br>árg. 10/92, km 190.000<br>**60.000,-** | **Toyota Carina XL TD**<br>gráur, 4 hurðar, 5 gear,<br>árg. 02/97, km 93.000.<br>s‡na› ur 04/02 **130.000,-** |
| **Mazda 626 HB 2,0 DiTD GLX**<br>grønur, 4 hurðar, 5 gear,<br>árg. 10/98, km 72.000<br>s‡na› ur 03/02 **158.000,-** | **Suzuki Alto 1,0 Automatic**<br>bláur, 3 hurðar, aut. gear,<br>árg. 09/97, km 85.000.<br>**50.000,-** |
| **Mazda 626 S 1,8i LX**<br>svartur, 4 hurðar, 5 gear,<br>árg. 09/92, km 95.000<br>**68.000,-** | **Renault Megane 1,6e**<br>reyður, 5 hurðar, 5 gear,<br>árg. 12/96, km 70.000<br>s‡na› ur 09/00 **80.000,-** |
| **Mazda 929 S 2,2i GLX**<br>bláur, 4 hurðar, 5 gear,<br>árg. 04/88, km 145.000<br>**28.000,-** | **Toyota Corolla Sedan 1,6 XL**<br>reyður, 4 hurðar, 5 gear,<br>árg. 04/88, km 232.000.<br>s‡na› ur 03/02 **14.000,-** |
| **Mazda 626 HB 2,0i GLX**<br>reyður, 5 hurðar, 5 gear,<br>árg. 08/92, km 156.000<br>s‡na› ur 04/01 **60.000,-** | **Toyota Carina Sedan 1,8 CDX**<br>grønur, 4 hurðar, 5 gear,<br>árg. 10/97, km 44.000.<br>**98.000,-** |
| **Daewoo Nexia GL**<br>bláur, 3 hurðar, 5 gear,<br>árg. 11/97, km 39.000<br>**65.000,-** | VØRUVOGNAR<br>**Mazda E2200 4x4 trælast**<br>reyður, 2 hurðar, 5 gear,<br>árg. 04/97, km 115.000<br>**128.000,-** |
| **Citroen Saxo 1,5 D Diesel**<br>grønur, 3 hurðar, 5 gear,<br>árg. 01/99, km 38.000<br>**108.000,-** | **VW Taro 4x4**<br>bláur, 2 hurðar, 5 gear,<br>árg. 11/91, km 222.000<br>s‡na› ur 12/00 **62.000,-** |
| **Opel Corsa 1,0i 12V**<br>svartur, 3 hurðar, 5 gear,<br>árg. 03/00, km 27.000<br>**78.000,-** | **Mazda B2500 PlusCab DX 4x2**<br>reyður, 2 hurðar, 5 gear,<br>árg. 05/97, km 89.000<br>**78.000,-** |
| **Fiat Brava GT 103HK**<br>reyður, 3 hurðar, 5 gear,<br>árg. 07/99, km 35.000<br>**110.000,-** | **Ford Transit DupultCabin Trælast**<br>gráur, 3 hurðar, 5 gear,<br>árg. 06/94, km 80.000<br>s‡na› ur 03/01 **52.000,-** |
| **Ford Escort 1,8 TD St. car**<br>reyður, 5 hurðar, 5 gear,<br>árg. 08/97, km 50.000<br>s‡na› ur 02/00 **110.000,-** | **Mazda B2500 PlusCab 4x4 DX**<br>reyður, 2 hurðar, 5 gear,<br>árg. 07/98, km 49.000<br>**128.000,-** |

**BERG MOTORS**
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35